# Føroyingar stuðla kristnari útvarpsstøð í Grønlandi

**Sjey fríkirkjur í Grønlandi hava ætlanir um at fara undir útvarpsarbeiði, við tí endamáli at vera ein rødd í Grønlandi. Føroyingar stuðla eisini hesi ætlanini.**

**Grønland:** Kristna útvarpsrásin Lindin hevði í hesum sambandi eina serstaka stuðulssending leygarkvøldið undan páskum.

Í hesi sendingini høvdu lurtarar kring landið høvið at stuðla ætlanini, við at ringja inn og tekna teg fyri eina ávísa peningaliga upphædd.

Í sendingini vóru áhugaverd prát við fólk í Grønlandi og við fólk her á landi, sum hava eitthvørt serstakt at siga frá í samband við Grønland.

Eisini luttóku sangararnir Martin Joensen, Sigrid Rasmussen, Theodor Petersen, Birgit Thomsen, Bárður á Lakjuni, Karl Johannesen og onnur.

Hetta kvøldið vóru savnaðar um 80.000 krónur inn til hesa ætlaðu útvarpsrásina.

- Einki er at ivast í, at ein evangelisk sendistøð sum henda fer at hava stóran týdning fyri eitt fólk, sum er so spjatt og hevur so stóran tørv sum Grønland, verður sagt úr Lindini.

Lindin hevur seinastu árini savnað pening inn til ymisk evangelisk arbeiði kring heimin. Í fjør varð gjørt av, at peningurin skuldi latast til "Børn kring heimin". Hetta tiltak fevndi um stuðul til trý støð - eitt gentuheim í Nakuru í Kenya, summarlegur fyri børn í Rumenia og stuðul til arbeiðið millum børn í Kiev í Ukreina.

Aftanfyri ætlanina stendur felagsskapurin INO, sum er ein stytting fyri "Inuunerup Nutaap Oqaluffa". Hesin felagsskapurin fevnir um sjey kristnar samkomur, sum liggja í Nuuk, Maniitsoq, Sisimiut, Aasiaat, Ilulissat, Kullorsuaq og Upernavik.

**sb.**



*Vælvitjað páskastevna aftur í ár*

*Savnsmynd*

# Páskastevna til allan heimin

**Hesar páskirnar skipaði samkoman Oasan fyri stevnu við fleiri útlendskum gestum.**

**Hoyvík:** Umframt høvuðstalarin, Jerome Ocampo hevði samkoman eisini vitjan úr Bergen.

Á skránni vóru bæði morgun- og kvøldmøti, umframt ymisk tiltøk serliga ætlað familjum og ungdómi.

- Vit fingu ein uppbyggjandi og avbjóðandi boðskap, bæði frá høvuðstalaranum Jerome Ocampo og frá øðrum luttakarum, verður staðfest í samkomuni.

Nógv fólk kring alt landið vóru til páskastevnuna. Tey, sum á einhvønn hátt ikki kundu fara til møtini, høvdu kortini møguleika at fáa møtini við umvegis kristnu útvarpsrásina Lindina.

Tey skipaðu soleiðis fyri, at øll møtini vórðu send beinleiðis, soleiðis at fólk við útvarpslurtinum ella við telduna kundu vera við á møtunum.

**sb.**

**Til tygara tænastu!**

**Hevur tú Shell-viðskiftakort, so ført tú ókeypis kaffi á Shell-støðunum**




**í Klaksvík**
**í Gøtudali**
**á Frælsinum**
**og við Ringvegin í Havn**



**Skjern Bank bjóðar til íløgufundur**

Týsdagin 1. apríl 2008 kl. 18.00 á Hotel Føroyum

Skráin:
Kl. 18.00 Vælkomst
v/ íløguráðgeva Gunnar Streymoy, Skjern Bank

Kl. 18.10 Partabrævamarknaðurin í 2008 – við denti á USA
v/ íløgustjóra Søren Hvidberg, Skjern Bank

Kl. 19.00 Tvær nýggjar og spennandi vørur frá Skjern Bank
– fá min. 5,6% í rentu yvir tvey ár
– fá 150% av dollarhækkingini
v/ íløgustjóra Søren Hvidberg, Skjern Bank

Kl. 19.15 Bankin bjóðar ábit

Tilmelding á gst@skjernbank.dk ella á tlf. 516227 í seinasta lagi tann 28. mars 2008.

Avmarkað nøgd av plássum »først til mølle-princippet«.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK